## Stríðast um floksnavn

Yvirhúsið í kekkiska tjóðartinginum hevur gjørt av, at landsins kommunistaflokkur má fáa sær eitt annað navn.

Í teimum flestu londunum í Eysturevropa fingu kommunistaflokkarnir sær nýtt navn, tá Jarntjaldið fall, men í Kekkia varðveitti flokkurin navnið. Men tað gongur ikki longur, tí samtyktin hjá yvirhúsinum sigur, at kommunistaflokkar og nazistaflokkar hava ikki loyvi at virka í Kekkia. Men lógaruppskotið verður uttan iva felt í undirhúsinum, tí har hava kommunistarnir og sosialdemokratarnir meiriluta. Talsmenn hjá kommunistaflokkinum vilja vera við, at samtyktin í yvirhúsinum er í stríð við kekkisku grundlógina.

Kommunistarnir vórðu riknir frá valdinum í Kekkia í november í 1989, tá rithøvundurin Vaclav Havel stóð á odda fyri einari kollvelting ímóti stýrinum. Men flokkurin fær framvegis lutfalsliga stóra undirtøku ímillum veljararnar.

## Leita eftir milliardum

Russisku myndugleikarnir eru farnir at leita eftir nógvum milliardum krónum, sum skulu vera horvnar úr tí stóra oljufelagnum Yukos.

Myndugleikarnir siga, at talan er um einar 40 milliardir krónur, og at pengarnir eru sendir ólógliga av landinum í árunum frá 2000 til 2003. Mikudagin rannsakaði løgreglan skrivstovurnar hjá Yukos í Moskva, og samstundis var niðurlendska løgreglan inni á skrivstovunum hjá Yukos í Amsterdam og leitaði eftir skjølum.

Fyrrverandi stjórin í Yuikos, Mikhail Khodorkovskij, sum eisini átti ein stóran part av fyritøkuni, fekk í summar átta ára fongsul fyri skattasvik og fíggjarundandrátt.

Men løgreglan í Moskva leggur dent á, at leiðslan í fyritøkuni var ikki einsamøll um at flyta pengarnar av landinum. Eitt nú eru fleiri russiskir bankar undir illgruna fyri at hava flutt pengar ólógliga úr Russlandi, og løgreglan hevur eisini illgruna um, at úrlendskir bankar og útlendskar fyritøkur vóru uppií, skrivar AP. Tí umfataði húsarannsóknin mikudagin ikki einans skrivstovurnar hjá Yukos, men eisini fleiri fyritøkur, sum hava samstarvað við Yukos.

## Kann enda í fongsli

Danski rithøvundurin, filmsmaðurin og ítróttarviðmerkjarin Jørgen Leth er av álvara komin í andglettin, síðani hann gav út sína ævisøgu fyri nøkrum døgum síðani.

Í bókini, sum hevur heitið "Det Uperfekte Menneske", skrivar Jørgen Leth millum annað, at hann hevur havt kynsliga samveru við tveimum 17 ára gomlum gentum í Haiti. Tað er serstakliga óheppið, tí Jørgen Leth er danskur konsul í Haiti, og uttanríkisráðið í Keypmannahavn hevur eisini sagt, hevði ráðið vitað av hesum, hevði hann ikki fingið starvið sum konsul.

Frásøgnin í bókini hevur eisini vakt ans í Haiti. Ein løgfrøðingur í løgmálaráðnum har sigur við BT, at Jørgen Leth kann fáa upp í tíggju ára fongsul, kemur hann til Haiti. Sambært haitiskari lóg er tað bannað at hava kynsliga samveru við fólki, sum eru yngri enn 18 ár, og sjálvt um tilburðirnir vóru fyri ávikavist tíggju og sjey árum síðani, er málið ikki fyrnað, sigur haitiska løgmálaráðið.

## Prestur hevði barnaporno

Ein 72 ára gamal amerikanskur prestur rindaði við bankakortinum, tá hann keypti barnapornografiskt tilfar á alnótini, og tað gjørdi, at løgreglan kundi taka hann.

Tá løgreglan fór at kanna telduna hjá prestinum, funnu løgreglumenninir 150 barnapornografiskar myndir í telduni. Presturin hevur viðgingið, at hann hevur brotið lógina, og hann hevur samstundis gjørt av at fara frá eftir at hava arbeitt 44 ár sum prestur, skrivar AP. Nú kann hann fáa upp í fimm ára fongsul.

Presturin bleiv avdúkaður saman við umleið 1.200 øðrum, tá amerikonsku myndugleikarnir fóru at kanna, hvør hevði keypt barnapornografiskt tilfar frá einari fyritøku í Hvítarusslandi. Tað vísti seg, at fleiri høvdu rindað við bankakorti, og so var lætt hjá løgregluni at avdúka tey.

# Fuglakrímið kann gerast ein heimsumfatandi sótt

**Granskarar stúra fyri, at fuglakrímið kann breiða seg sum spanska sjúka í 1918. Hon kravdi ímillum 20 og 50 milliónir mannalív**

SJÚKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


*Fuglakrímið kom upprunaliga frá høsnum í Landssynningsasia, og har hevur sjúkan kravt fleiri mannalív.*

Granskararnir vita ikki, um fuglakrímið kann fara at breiða seg sum ein heimsumfatandi sótt, og teir vita heldur ikki, nær tað so kann henda. Men teir eru á einum máli um, at tey seinastu kanningarúrslitini vísa, at tað er neyðugt at taka vandan í álvara.

Tey seinastu tíggju árini hava amerikanskir granskararar at kanna virusið, sum breiddi seg um heimin í 1918, og sum kostaði millum 20 og 50 milliónir mannalív. Úrslitið vísir, at virusið, sum elvdi til sponsku sjúku, kom beinleiðis frá fugli. Spanska sjúka var eitt slag av fuglakrími, hvørs arvaeginleikar broyttust spakuliga, til sjúkan gjørdist lívshættislig hjá fólki. Nú royna granskararnir so at bera hetta gamla virusið saman við virusð í fuglakríminum, sum hevur kravt fleiri mannalív tey seinastu árini.

- Fuglakrímið, sum vit kenna nú, og virusið í sponsku sjúku hava longu fleiri felags eyðkenni, og tí eiga vit at taka støðuna við størri álvarssemi enn higartil, sigur Lars R. Haaheim, professari á lærda háskúlanum í Bergen, við Dagsavisen.

Uppgávan hjá granskarunum er nú et gera eitt yvirlit yvir, hvussu virusið í fuglakríminum skal broyta seg, fyri at sjúkan kann enda sum eitt sótt, ið kann krevja fleiri milliónir mannalív. Úrslitini higartil benda á, at fuglakrímið kann vera í ferð við at gerast ein nýggj spanska sjúka.

Jeffery K. Taubenberger, sum hevur staðið á odda fyri teimum amerikonsku kanningunum, sigur við Washington Post, at granskararnir vóna at kunna gera eitt yvirlit yvir, hvussu virusið í fuglakríminum broytist, og hvussu vandin fyri einari sótt økist, so hvørt sum virusið broytist.

# Guð bað Bush leypa á Afghanistan og Irak

**-Guð bað meg fara í kríggj í Afghanistan og Irak. Tað skal amerikanski forsetin hava sagt palestinska forsætisráðharranum, Mahmoud Abbas**

BUSH
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Tað er kortini ikki Mahmoud Abbas, sum avdúkar hendan partin av samrøðuni teirra millum í juni í 2003, men Nabil Shaath. Hann er palestinskur kunningarmálaráðharri og var hjástaddur undir tinginganum.

- Bush segði við okkum: "Eg havi fingið eitt kall frá Guði. Guð hevði sagt: "George, tú skalt berja yvirgangsmenninar í Afghanistan niður". Tað gjørdi eg. So hevði Guð sagt: "George, tú skalt gera av við harðræðisstýrið í Irak". Og tað gjørdi eg. Nú kenni eg aftur á mær, at Guð hevur kallað meg og sagt: "George, tú skal geva palestinunum teirra egna ríki, geva ísraelsmonnum trygd og Miðeystri frið". Og Guð veit, eg skal gera tað, sigur Nabil Shaath í samrøðu við BBC.

Mahmoud Abbas váttar fyri BBC, at kunningarmálaráðharri hansara sigur satt.

- Bush segði okkum eisini, at hann hevði eina moralska og átrúnaðarliga skyldu, og at hann tí skuldi tryggja palestinum egið ríki, sigur Abbas.

Sendingin kom í BBC, júst sum amerikanski forsetin roynir at doyva amerikonsku atfinningarnar ímóti krígnum í Irak. Hann vil vera við, at víðgongdar islamskar kreftir vilja hava eitt islamistiskt ríki frá Spania til Indonesia, men sigur, at USA fer at forða fyri hesum.

- Tað finst bara ein háttur at verja seg ímóti slíkum. Vit fara ongantíð at slaka, vit fara ongantíð at gevast, og vit góðtaka einki uttan ein fullkomnan sigur, segði amerikanski forsetin fyrradagin. Samstundis vísa meiningakanningar, at alt færri og færri amerikanarar taka undir við krígnum í Irak, sum higartil hevur kostað 1.940 amerikonskum hermonnum lívið, skrivar AP.